**UTTAN ÚR HEIMI**

## Clinton hjálpir Kerry

Fyri minni enn tveimum mánaðum síðani mátti fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton leggjast undir skurð, tí hann hevði trupulleikar við hjartanum, men kortini er hann nú farin upp í forsetavalstríðið.

Demokratarnir hava boðað frá, at Clinton fer undir eitt átak fyri John Kerry mánadagin, og at hann fer at leggja fyri í býnum Philadelphia. Býurin er í statinum Pennsylvania, har tað stendur á jøvnum ímillum Kery og George W. Bush, men demokratarnir vóna, at Clinton kann útvega Kerry so mikið av atkvøðum afturat, at hann kann vinna valið har.

Sambært BBC hevur Bill Clinton eisini eggjað demokratiskum stuðlum til at lata pengar til valstríðið hjá Kerry.

## Rabbinar elva til rok

Ísraelska herleiðslan er í øðini, tí 60 rabbinar hava eggjað hermonnunum til at siga nei, tá herleiðslan fer at biðja teir flyta tey jødisku niðursetufólkini úr Gaza-geiranum. Rabbinararnir siga, at Gaza er partur av tí Ísrael, sum Guð hevur givið jødunum, og tí eru teir ímóti ætlanini hjá Ariel Sharon, forsætisráðharra um at flyta øll tey 8.000 niðursetufólkini úr geiranum.

Fleiri av niðursetufólkunum hava boðað frá, at tey fara ikki at flyta við góðum, men myndugleikarnir hava svarað, at tey , sum ikki fara sjálvboðin, verða flutt við makt. Tað skal herurin gera, og Moshe Yaalon, verjuovasti, er eisini í øðini inn á teir 60 rabbinararnar. Hann sigur, at tað kann als ikki góðtakast, at nakar mælir hermonnunum til at seta seg up ímóti leiðsluni.

– Eitt tílíkt tilmæli er vandamikið fyri herin, samfelagið og ísraelska ríkið, sigur Moshe Yaalon.

Tey mest víðgongdu niðursetufólkini í Gaza-geiranum hava hótt við at taka vápn í hond, gera myndugleikarnir álvara av hóttanini at senda herin eftir teimum.

## Tilboð um skattafrælsi

Norski reiðarin John Fredriksen, sum hevur búð uttanlands í fleiri ár, boðaði í fjør frá, at hann ætlaði sær at flyta aftur til Noregs at búgva. Hetta varð kortini av ongum, tí John Fredriksen helt, at hann skuldi gjalda alt ov nógvan skatt, flutti hann heimaftur.

Reiðarin sigst eiga umleið 35 milliardir norskar krónur, og vil hann sleppa undan at gjalda skatt av ognini, kann hann velja at flyta til okkurt annað land. Aftenposten skrivar, at John Fredriksen hevur fingið tilboð úr fleiri londum, sum fegin vilja hýsa honum, og sum eru til reiðar at geva honum skattafrælsi. Millum londini eru Kanada og Niðurlond.

Norskir politikarar vilja ikki gera eina skattalóg, sum einans skal koma teimum ríkastu til góðar.

## Marknatræta loyst

Myndugleikarnir í Russlandi og Kina eru vorðnir samdir um at loysa eitt 150 ára gamalt stríð um markið ímillum tey bæði londini.

Semjan, sum teir báðir forsetarnir, Vladimir Putin og Hu Jintao, skrivaðu undir í Beijing í síðstu viku, ber í sær, at Russland fær ræðið á einum øki, sum bæði londini hava kannað sær. Kina hevði kravt, ar russar skuldu leggja eina oljurørleiðing til Kina afturfyri, men tað vildu russar ikki. Ístaðin fyri játtaði Putin kinesarum 10 milliónir tons av olju næsta ár og 15 milliónir tonsí 2006.

Á fundinum í Beijing lovaði Hu Jintao, at Kina fer at stuðla royndunum hjá Russlandi at fáa limaskap í heimshandilsfelagsskapinum WTO. Eygleiðarar halda, at tað vóru ørindini hjá Putin, og at tilsøgnin frá kinesisku leiðsluni má sigast at vera ein stórsigur fyri russiska fortan.

# Ringasta veðrið í 10 ár

**Myndugleikarnir í Japan bera ótta fyri, at meiri enn 80 fólk hava latið lív í ódnarveðrinum, sum hevur herjað landið teir seinastu dagarnar**

ÓDNARVEÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Stormur og skriðulop hava oyðilagt nógv hús í Japan*

Í gjár høvdu bjargingarlið funnið 55 lík, men tá vóru 33 fólk ikki komin afturíaftur, og myndugleikarnir stúra tí fyri, at ódnin Tokage helst hevur kravt meiri enn 80 mannalív.

Sambært bjargingarliðunum doyðu tey flestu, tá skriðulop tóku hús og bilar við sær. Onnur druknaðu, tá oysandi regn legði stór øki undir í vatni, tí fleiri áir fóru upp um áarbakkarnar. Eitt skúlaskip sjá sjóvinnumyndugleikunum við 167 fólkum umborð fór á land nakað vestan fyri Tokyo, men tað eydnaðist bjargingarliðunum at bjarga øllum.

Í sjálvum Tokyo máttu myndugleikarnir flyta nógv fólk burtur, og fleiri skúlar vórðu stongdir. Nógv almenn starvsfólk fingu eisini frí, tí stovnarnir lótu aftur. Minst 40.000 húsarhald á Tokyo-leiðini mistu streymin.

Japanskir veðurmenn siga við Reuter-tíðindastovuna, at Torkage hevur gjørt størri skaða enn tær flestu ódnirnar, sum hava herjað landið, og orsøkin er, at hon rakti ein nógv størri part av landinum, enn tílíkar ódnir vanliga gera, siga teir.

Veðurmenninir siga, at ódnin er tann ringasta í tíggju ár, men hon hevur kravt fleiri mannalív enn nøkur onnur ódn siðani 1991, tá ódnarveður kostaði 62 fólkum lívið.

Tokage er tann 10. ódnin, sum hevur rakt Japan í ár, og meiri enn 100 fólk hava latið lív. Fyrr í hesum mánaðinum rakti ódnin Ma-on Tokyo, og seks fólk doyðu.

# Andstøðupolitikarar bukaðir og settir fastir

**Tað er ikki lukkuligt at mótmæla hvítarussiska forsetanum, Alexander Lukasjenko**

HVÍTARUSLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hvítarussisk lóg bannar fólki at ganga mótmælisgongu ímóti myndugleikunum, og tí var løgreglan skjót, tá umleið 500 umboð fyri ta politisku andstøðuna gingu mótmælisgongu í høvuðsstaðnum Minsk týskvøldið.

Fleiri mótmælisfólk vórðu tikin, teirra millum tríggir leiðandi politikarar í andstøðuni. Russiskar tíðindastovur skriva, at ein av politikarunum, Anatolij Lebedko, royndi at sleppa til rýmingar, men at løgreglan jagstraði hann inn á eina matstovu. Løgreglumenninir stongdu síðani dyrnar, og Lebedko bleiv bukaður og síðani handtikin. Hann mátti tó á sjúkrahúsið fyrst.

Tríggir aðrir andstøðupolitikarar, sum vóru uppi í motmælisgonguni, eru dømdir at sita ímillum 10 og 15 dagar í fongsli.

Ein av teimum dømdu segði við russiska útvarpið Ekho Moskvy týsdagin, at andstøðan kann ikki góðtaka úrslitið av fólkaatkvøðuni og tjóðartingsvalinum seinasta vikuskiftið, men at Alexander Lukasjenko, forseti, hevur givið løgregluni boð um at kvala øll mótmæli.

Sambært almennu valnevndini fekk andstøðan ikki ein einasta tinglim á valinum. Bæði ES, evropeiski samstarvsfelagsskapurin OSCE og USA siga, at valið var merkt av umfatandi sviki.

Russland hevur haraftur-ímóti góðtikið valúrslitið, men russiskir fjølmiðlar eru alt annað enn hugtiknir av úrslitinum.

– Lukasjenko hevur styrkt støðu sína sum einaræðisharri. Við hesum valinum hevur hann prógvað, at hann megnar at ganga í fótasporum Stalins, skrivaði blaðið Moskovskij Komsomolets fyrradagin.



# Føroyskur barnadansur

**Aftur í vetur skipar Tøkum Lætt fyri barnadansi**

DANSUR
*Tíðindaskriv frá Tøkum Lætt*

Byrja verður 20. oktober. Ætlanin er at børnini skulu fáa eina hugnaliga løtu har høðursdenturin verður lagdur á kvæðini. Men tað verður eisini pláss fyri eini hugnaligari løtu við onkrum leskandi og eini góðari søgn ella einum góðum ævintýri.

Dansa verður hvørt mikukvøld kl. 19.00-20.00.

Øll børn eru hjartaliga vælkomin – tey heilt smáðu skulu helst hava ein vaksnan við sær. Størri bólkar t.d. ein skúlaklassi við lærara eru eisini vælkomin at luttaka, so kunnu vit samstarvað soleiðis at næmingarnir kunnu venja tey kvæðir, ið verða tikin í barnadansinum sum ein náttúrligur partur av tí obligatorisku undirvísingini í skúlanum.

Dansurin verður skipaður av frívilligum limum hjá Tøkum Lætt og luttakandi børn skulu einki gjalda. Øll børnini fáa eitt hefti við kvæðum og vísum til gávu.




